

SEPTEMBER 2022

# TJÓÐLEIKHÚS FØROYA

ARKITEKTAKAPPING

## DÓMSNEVNDARÁLIT

Mynd frá leikinum *Gentukamarið*, Tjóðpallur Føroya 2022, mynd: Finnur Justinussen

# 1 Tjóðleikhús Føroya - Arkitektakapping

Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk bjóðaðu á vári 2022 hesum undangóðkendum ráðgevum at luttaka í framhaldinum av tilgongdini at gera uppskot til Tjóðleikhús:

Kontrast
MAP Arkitektar
Henning Larsen NA
SNA – Selmar Nielsen Arkitektar / White Arkitekter
Zeta architects / Brim Arkitektar

Grundarlagið fyri hesa kappingina var kappingin um staðseting av Tjóðleikhúsinum, sum hildin varð á vári 2021, við tillagingum í mun til heildarætlanin fyri Eystara Havnarøki, ið Tórshavnar kommuna síðani gjørdi við íblástri úr hugskotskapping, sum varð hildin á heysti 2021.

Tá ið innlatingarfreistin var úti, tann 25. august 2022, vóru fýra uppskot latin inn. Øll innkomnu uppskot luku treytirnar og eru tey øll gjølla viðgjørd í dómsnevndini, hvørs samrøður og metingar eru samanskrivaðar í hesum nevndaráliti.

**Í dómsnevndini vóru:**
Ólavur Jøkladal, formaður í Leiklistaráðnum – formaður í dómsnevndini
Bjarni Wilhelm, formaður í bygginevndini fyri Tjóðleikhúsið
Poul Geert Hansen, aðalstjóri í Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Jenny C. Petersen, stjóri í Tjóðpalli Føroya
Birita Wardum, býararkitektur í Tórshavnar kommunu
Bárður í Baianstovu, arkitektur hjá Landsverki
Ellen Braae, fakdómari, tilnevnd av Arkitektafelag Føroya
Kjetil Thorsen, fakdómari, tilnevndur av Arkitektafelag Føroya

**Sum ráðgevarar við ongum avgerðarrætti vóru hesir dómsnevndini til hjálpar:**
Torsten Nobling, AIX Arkitekter, serkønur í projektering av leikhúsum
Turpin N. Djurhuus, ljóssniðgevi og leikhúskønur
Jóannes Steingrund, akustikari
Helgi D. Michelsen, fornfrøðingur, Tjóðsavnið
Nina A. Arge, verkætlanarleiðari hjá Landsverki

**Skrivari hjá dómsnevndini var:**
Lilja Thorsteinsson

Dómsnevndin var saman frá mánadegi 29. august til og við hósdag 1. september og var tvær ferðir á byggiøkinum. Á fyrsta fundi skipaði hon seg við Ólavi Jøkladal sum formanni.

Í kappingarskrivinum varð boðað frá, at uppskotini fóru at verða dømd eftir hesum fortreytum, sum tó ikki vóru at skilja sum ein raðfesting:

- **Arkitektonisk hugsjón**
- **Funktionalitetur**

- **Samspæl við nærumhvørvið**
- **Byggibæri, heildarkostnað og umhvørvisatlit**

## 2 Dómsnevndarálit

**Almennar viðmerkingar**
Tey fýra uppskotini eru øll væl skikkað og áhugaverd boð upp á eina torgreidda uppgávu, sum bæði leggur dent á at skapa teir allarbestu karmar til at útinna og njóta ta palllist, sum skal vísast fram á pøllunum, og at seta sítt merki á býin og landsins nýggja tjóðleikhús og harafturat skal passa inn í virksemi og støddarlutfall í tí fjølbroytta býarrúminum á Eystaruvág í Havn, sum í nógvum støðum er merkisvert bæði viðvíkjandi søgu og landslag.

**Arkitektonisk hugsjón**
Tey fýra innkomnu uppskotini til nýtt tjóðleikhús í Havn vísa, at tað ber til at fara í holt við hesa uppgávu á ymsan hátt. Hvør verkætlan hevur sína egnu arkitektonisku framferð, hugasambond, tulkingar, programmering, fagurfrøði og úttrykk. Hetta fjølbroytni kemur til sjóndar í margbroyttari flokkingarfrøði, sum sýnir, at møguleikanna rúm hjá byggilistini í okkara tíð er sera stórt, og at hugtaksbrøgd kunnu hava íblástur bæði heima og í øðrum londum. Tað er hugaligt at síggja, hvussu reglufast og væl kend tann arkitektoniska framferðin er í formi og tilfari í verkætlanunum.

Tey fýra hugtøkini kunnu samanfatast á henda hátt:

***Hús sum ein bygd (uppskot 17283)***




***Hús sum paviljong (uppskot 27072)***



***Hús sum sambindingarliður (uppskot 95516)***



***Hús í húsinum (uppskot 36912)***



Sum byrjan eru øll hugtøk viðkomandi, tó hvørt á sín hátt. Hugsanin um gávumilt at lata býnum og fólkinum í býnum eitthvørt aftur er rótfest í hvørjum verkætlanaruppskoti. Tað er eyðsæð, at uppskotssetararnir vilja hava eitt tjóðleikhús, sum er nær við brúkarar og áskoðarar, við lágari gátt, góðari almennari atkomu og gjøgnumskygni. At skilja tann felagstýdning, sum tjóðleikhúsið hevur fyri at menna starvandi list ger verkætlanirnar passaliga sjónligar, sakligar og nærverandi, tó við ymsum eyðkennum og skapi.

**Funktionalitetur**
Viðvíkjandi funktionaliteti eru tey ymisku hugskotini meiri og minni hóskandi til tey rættiliga torgreiddu virkishøpi, sum eru í einum tjóðleikhúsi. Hetta er serstakliga galdandi fyri tvær av verkætlanunum (sum uppskot 36912), har ið hugtak og ytri formur stýra staðseting av virksemi í bygninginum. Arbeiði dómsnevndarinnar hevur verið at finna eina verkætlan, har ið samanhangurin millum hugtak og virki arbeiðir á bestan hátt fyri býin sum heild, fyri vitjandi, áskoðarar, listafólk og onnur starvsfólk.

Salur og pallur eru tjóðleikhúsins mót, har ið listin og áskoðararnir hittast. Her kyknar úrslitið av øllum øðrum virksemi í húsinum. Forhøll, "front of house" virksemi og áskoðarar møta venjingarrúmum, vøruavgreiðslu, verkstøðum, goymslum og skrivstovuhølum – eisini kallað "back of house" – beinleiðis ella óbeinleiðis í salunum. Teir tríggir salirnir hava ymiska uppgávu, og stórisalur er tann einasti við palltorni og snóralofti. Hædd og staðseting av palltorninum er avgerandi fyri ikki bara húsins útsjónd, men eisini virksemisbýti. Allar verkætlanirnar hava tornið við í sínum formmáli. Tað merkir, at sambandið millum formin og góða staðseting av torni, palli og sali verður avgerandi fyri útsjónd og virksemi um somu tíð. Tvær av verkætlanunum (uppskot 36912 og uppskot 17283) víkja frá tí siðbundnu hugsanini um beinleiðis samband millum lítlasal og black box til síðupallar og verkstøð. Hetta kundi møguliga givið nýggja og spennandi samanblanding av áskoðarum, listarfólki og innanhýsis flyting av pallútgerð og góðsi, men dómsnevndin hevur mett, at hetta verður avbjóðandi serstakliga við gestasýningum, sum longu eru lagaðar til klassiskt virksemisbýti. Allir salirnir kunnu gerast innan fyri tær givnu loysnirnar viðvíkjandi akustikki, ljósi og sýni. Allar uttan ein (uppskot 17283) hava rætt hall ímóti pallkantinum í uppskotinum um stórasal. Dómsnevndin ivast í, um einum so tøttum stórasali nýtist balkong, uttan so at hon kann umbyggjast til eina tøknibalkong, tá ið tað krevst.

Allar verkætlanirnar hava loyst spurningin við orkesturgrøv, men tað er ymiskt, hvussu góð atkoman er hjá tónleikarum, og hvussu ávirkanin er í salinum.

Spurningurin er eisini settur, um tað er ynskiligt at hava dagsljós í nøkrum sali. Lítlisalur kundi kanska verið eitt undantak, men at lata upp til t.d. black box (sum uppskot 17283) tykist ikki vera eftir ætlanini við hesum pallslag. Allar verkætlanirnar høvdu havt brúk fyri einari gjøgnumgongd av planlogistikki, bæði "front of house" og "back of house". Tað er natúrligt at hugsa sær hetta gjørt í samspæli við brúkararnar í húsinum. Dómsnevndin saknar sum heild lýsingar og strikumyndir av ætlanunum viðvíkjandi logistikki og innanhýsis ferðslu í øllum uppskotunum.

Áskoðaraøkini eru týdningarmikil, eisini tá ið framførslur ikki eru á skránni. Tey eru serstakliga týdningarmikil undan, í steðginum og eftir framførslurnar. Dómsnevndin metir, at tey avlongu økini í forhøllini fram við vestur- og suðursíðuni á bygninginum (sum uppskot 27072 og uppskot 95516) hava bestu loysn til, hvussu áskoðarar koma inn í salirnar, sambandið við útiøkini og sjónliga virksemið í húsinum. Henda staðseting veitir samstundis góðan ljóðdoyvara millum salir og havnarvirksemi. Allar verkætlanir, uttan ein, undirmeta vesitørv og smidliga menniskjaferðslu í steðginum. Allar hava matstovu tætt við inngongdina til stórasal. Hetta kann vera ein avbjóðing fyri ferðslu undan, í steðgi og eftir framførslur, fyri tign og fyri matarroyk.

**Samspæl við nærumhvørvi**
Tað eyðkennir allar verkætlanir, at heildarætlanin fyri menning av nærumhvørvinum hevur ikki verið líka nógv í miðdepli í svarunum sum sjálvur leiklistabygningurin. Hóast hetta er sjálvsagt út frá uppgávuorðingini, sæst sera lítið

til ætlanirnar hjá býarskipanardeildini um stigvísa umskaring vestanífrá eystureftir, fram við havnini og reyninum norðanfyri. Grundreglurnar, sum skulu stýra skiftinum frá teirri tættu og lágu býarkjarnuni til størri stovns- og havnarbygging, eiga eftir kappingina at verða gjøgnumgingnar hjá myndugleikunum, til tess at ein lættfatilig langtíðarætlan kann leggjast. Hetta er serstakliga galdandi fyri staðseting av Tjóðleikhúsgrundøki og bussfarstøð: Staðseting av Tjóðleikhúsgrundøki avger samspælið millum Tinganes, Skansan og tann nýggja leiklistarbygningin og er sostatt eitt sera eymt mál. Dómsnevndin hevur mett, at tað er týdningarmikið, at tað sæst í beinari linju av ytsta parti í Tinganesi út á Skansan, og avgerandi fyri søguliga samanhangin og tjóðleikhúsins sjálvstøðu og eyðkenni. Tað er sostatt týdningarmikið, at staðsetingin av tjóðleikhúsinum ger tað møguligt at síggja tað eyðkenda suðurumhvarvið á Skansanum av teimum mest vitjaðu støðunum ytst í Tinganesi. Tær tríggjar eindirnar – Tjóðleikhús, Tinganes og Skansin – fara á henda hátt hvørt at geva øðrum pláss, og sædd á sløttum flata gerast tey horn í einum tríkanti, ein tríeind í sínámillum virðing.

Dómsnevndin hevur eisini víst á, at samanhangurin í býarskipanini verður torførur við tí staðseting, sum bussfarstøðin hevur fingið fyribils, og at ein gjøllig ferðslugreining eigur at gerast, soleiðis at asfalterað øki, sum bara eru til ferðslu, minka so nógv sum gjørligt. Dómsnevndin heldur eisini, at hesin trupulleiki er lýstur í teimum svarum, sum eru innkomin. Tey fýra hugskotini spenna frá at vilja nærkast tí tættu og lágu býarkjarnuni við torgum og smogum millum bygningar til ein yvirskipaðan geometriskan form, sum er heilt óbundin av umhvørvinum. Tær bestu verkætlanirnar hava medvitað valt at brúka plantuvøkstur bæði á bygningi og úti, og serstakliga uppskot 95516 og uppskot 36912 vísa, hvussu ein við vøkstri fær skapað góðan og einfaldan samanhang og yvirgongd.

Tað er ymiskt, í hvussu stóran mun verkætlanirnar hava viðgjørt útiøki, gróðurseting og landslagsarkitektur. Almenn pláss og útirúm eru partvíst flótandi og ikki-lýst. Samspælið við sjógvin á vágni er eitt upplagt tema, sum dómsnevndin hevur havt fyri eyga, tí at um ein leggur kaiina í terrassur, so at tað slepst heilt oman ímóti sjónum tætt við tjóðleikhúsið, fær ein brúkt ein stóran møguleika har á staðnum og latið eitt íkast til fjølbroytt býarlív við sjóvarmálan – frá sjálvgjørdum smáum tiltøkum til á ólavsøku – og soleiðis vakt ta kenslu í teimum vitjandi, at tað, sum fyrr var ídnaðarhavnarøki, í størri mun er blivið partur av býnum. Dómsnevndin metir, at um útiøkini og inniøkini verða meira brúkt fæst samrøðan við áskoðarar, sum vit ynskja, eisini lættari í gongd.

Tilfarið, sum er valt í verkætlanunum, verður í øllum uppskotum sæð í sambandi við umhvørvið, men eisini við hugskotið. Felagsbragd er, at brúkt verður viður og glas á veggjum úti og inni, betong í palløkjum og harðar flatur á felagsøkjum. Tað er ymiskt, hvussu lætt tað er at koma til tak og takpallar við plantuvøkstri í teimum ymisku uppskotunum.

**Byggibæri, heildarkostnað og umhvørvisatlit**
Øll uppskotini verða mett at vera byggibær, sum tey eru lýst í uppskotunum. Kortini er stór variatión í stødd og kostnað. Dómsnevndin hevur mett um, um størri stødd gevur fleiri møguleikar í tjóðleikhúsins rakstri og tilboðum, men niðurstøðan er, at fortreytirnar, sum eru í skránni, eru rættar í mun til, hvat verður raðfest sum týdningarmikið. Hetta merkir eisini, at tað eigur at bera til at byggja og skapa eitt gott tjóðleikhús innan fyri tær givnu støddarligu fortreytir.

Burðardygd er eitt týdningarmikið tema, sum verður lýst nakað eins í øllum verkætlanunum. Allar koma inn á sosiala burðardygd sum umráðandi fortreyt fyri, at tjóðleikhúsið skal vera alra ogn. Men eingin av verkætlanunum er kollveltandi, tá ið tað snýr seg um $CO_2$ og veðurlag. Uppskot eru um kendar loysnir, men í høvuðsheitum passiv tiltøk og $CO_2$-vinarligt tilfar. Bara ein verkætlan kannar dagslýsi á takflatum til at seta PV-plátur upp ella tak (uppskot 27072), tó uttan at siga nakað ítøkiligt um tilfarið á takflatuni.

Saknur er í virknari viðgerð av umhvørvismálinum í øðrum pørtum av byggjarínum, t.d. handfaring av ruski, vatn og frárensl, streymnýtsla og luftreinsan.

## 3 Niðurstøða

Dómsnevndin hevur avgjørt at lata hesar virðislønir (íroknað samsýning fyri innlatið modell):

**1.virðisløn 800.000 kr.: uppskot nr. 95516 við heitinum *Tjóðleikhús (MAP Arkitektar)***

(Avgjørt varð ikki at lata nakra 2. virðisløn, men tríggjar síðustillaðar 3. virðislønir)

**3. virðislønir á 400.000 kr., nevndar í nummeriskari raðfylgju:**

**uppskot nr. 17283 við heitinum *Tjóðpallur Føroya (Kontrast / Schmidt Hammer Lassen Architects / H+)***
**uppskot nr. 27072 við heitinum *Leikhúsið á heimsins enda (Selmar Nielsen Arkitektur / White Arkitekter)***
**uppskot nr. 36912 við heitinum *Rípa (ZETA architects / BRIM Arkitektar)***

Við grundarlag í gjøllari meting av øllum uppskotum við støði í teimum fýra metingartreytunum velur ein samd dómsnevnd uppskot 95516 til vinnara av kappingini (øll metingin av øllum uppskotum finst niðanfyri).

Uppskot 95516 skarar framúr á øllum givnum økjum: Arkitektonisk hugsjón, funktionalitetur, samspæl við nærumhvørvið og byggibæri, heildarkostnað og umhvørvisatlit.

Tað hevur eitt týðiligt og snotiligt høvuðsbragd, sum sameinir og miðlar tað nógva virki í tjóðleikhúsinum. Logistikkurin og skipanin í tjóðleikhúsinum er sera sannførandi, og sum gestur fært tú eina stóra uppliving, og tað er lætt at vitja húsið. Bygningurin er gevandi í mun til sítt umhvørvi, tí hann við sínum terassum leiðir okkum inn í tjóðleikhúsins skala á sannførandi hátt, hann hevur bleytt dánað, spælandi og kortini rytmisk mynstur og er innbjóðandi á øllum fimm síðum, og bygningurin virkar bæði sum eitt nýtt útsýnisstað, haðani tú upplivir alt havnarrúmið, og sum trappusteinur til Skansan við sambandi til Skansan og sjónarringin. Henda sambinding uppraðfestir og sameinir Skansan sum leikara í tí stóra býarlandslagnum av nýggjum. Samstundis ger dómsnevndin við sínum vali eitt greitt tilmæli um, at tjóðleikhúsgrundøkið verður tillagað, og samsvarandi eigur busskoyring á Eystaruvág at endurskoðast, so at minkað verður um ferðslutunga dámin á tí øki, sum í framtíðini skal verða ein víðkaður miðbýur í Havn.

# 4 Meting av teimum einstøku uppskotunum

**1. virðisløn: uppskot 95516 – *Tjóðleikhús (MAP Arkitektar)***




**Arkitektonisk hugsjón**
Verkætlanin er vald sum einasti vinnari í kappingini, tí at hon lyftir seg upp um hini uppskotini á øllum týdningarmiklum parametrum í dómsviðgerðini. Uppskotssetararnir hava við einum djørvum, treystum og samstundis spølnum høvuðsbragdi víst sína ætlan, sum dómsnevndin heldur fer at passa væl inn í tann torgreidda býarliga og býarlandslagsliga samanhangin og eisini fer at trína fram sum Føroya nýggi mentanardepil.
Høvuðsbragdið er ein sameining av at knýta bý og bygning saman, at skapa flatur til allar síður, eisini eina fimtu síðu, at spæla við endurtøkurnar í føroyskum dansi og av stórari vitan um sjónleikatøknilig viðurskifti. Dómsnevndin metir, at dansurin endurspeglast frálíka væl í húsins høvuðsformi, og ivast í, um tað er neyðugt at leggja meira herðing á henda myndburð eisini í framsíðunum.
Húsið trínur fram sum ein nýggj heild, sum við sínari lívrunnu grundarflatmynd hóskar væl saman við Skansanum og við sínari snotiligu terassubygging  bæði savnar bygningsins partar til eina heild og ger heildarmyndina áhugaverda og lætta í samanhanginum. Húsið er samstundis sermerkt, glæsiligt og eyðmjúkt. Ein sera týdningarmikil og innbygdur partur av húsinum er "sloyfan": ein gøta snýr sær eina ferð rundan um tann næstan runda bygningin og palltornið og rennur longur eftir Havnargøtu til Skansan og ger soleiðis ein nýggjan, sjálvsagdan spákingartúr í hesum parti av Havnini og letur havnarøkið upp við tess sambandi við havið og sjónarringin.
Dynamikkurin millum tær skapleysu og sínámillum umskarandi hæddirnar og viðgerð av teimum einstøku húsaflatunum skal lýsast og umrøðast meira.

**Funktionalitetur**
Á fyrimyndarligan hátt nýta uppskotssetararnir sannførandi snild, tá ið sundurbýting av virksemi og innanhýsis samanspæl verður gjørt. Hvør funksjón hevur góðar rammur, og góð flóð er tryggjað innanhýsis bæði fyri gestir í front-of-house og fyri starvfólk, tøkningar og listarfólk í húsins back-of-house. Tað er snilt at seta tvær vøruútflýggjanir inn í verkætlanina. Eina við beinleiðis atgongd til palløkini og eina við atgongd til verkstøðini. Vøruútflýggjanin til palløkini má tó ikki tippa tvørgangandi innanhýsis sambond, sum tað er nú.




Salirnir eru væl staðsettir við ljóðdoyvandi byrging allan vegin runt. Sjálvur høvuðssalurin er snildisliga sundurbýttur millum gólv og balkong, av tí at balkongin, sum hon er formað, fer ikki at býta rúmið sundur í fleiri ljóðeindir. Tað má farast ígjøgnum, um talið á stólum er hóskandi, og tað skulu gerast neyvar kanningar av, hvussu sýnið er ímóti pallinum. Gjølla má metast um, hvussu reflektorarnir í stórasali verða formaðir og staðsettir. Orkesturgrøvin má kannast viðvíkjandi formi og atgongd. Síðu- og bakpallar er væl staðsettir, og samband og opilsi millum pallar og salir virka væl. Palltorn og snóraloft hava rætta støðd, men atkoman til ovastu hædd í palltorninum má kannast.
Yvirflatur og tilfar í øllum salum fara at verða týdningarmikil fortreyt fyri ljóðgóðskuna í salinum.
Í forhøllini veldst ljóðgóðskan um, hvat tilfar verður brúkt til loftini, og hvussu tann organiskt bogaði veggurin móti forhøllini er hugsaður í staklutum.

**Samspæl við nærumhvørvi**
Bygningurin verður innbygdur í tann ymisliga samanhangin á havnarøkinum á einfaldan og beinframan hátt, nevniliga við at innlima hann í ein "rygg" av sínámillum ójavnt staðsettum trøum, sum vaksa fram við berginum og Skansanum og nakað út á kaiøkið. Hetta einfalda bragd hevur nógvar góðar síður við sær: Tað hjálpir til at binda grótveggin og Skansan saman eftir longdini (útnyrðing-landsynning) sum ein grøn natúrgongd. Tað hjálpir til at fremja yvirgongdina tvørturum millum grótveggin/Skansaveggin og opið hav. Og tað hjálpir til at skapa nøkur rúm undir trækrúnunum, sum kunna fremja nýtslu av økinum millum tjóðleikhúsið og býin sum eitt nýtt alment rúm, sum við tíðini fær hýst bygningum.



Sloyfan, sum sleingir seg gjøgnum bygningin og endar sum brúgv yvir á Skansan, skapar nýggj ferðamál og nýggj sambond. Á vegnum ber til at steðga á á bygninginum, kanska vitja tað lítla kaffihúsið, og á túrinum rundan um palltornið fáa eina 360 stig mynd av havnarrúminum við Skansanum, Tinganesi og fjøllum og oyggjum í nánd sum føst mið. "At ganga til sjónleik" fær alt í einum nýggja merking. At halda fram og knýta Skansan uppí letur upp fyri sjónum og sjónarringinum. Harafturat er uppskot um fínar terassur á kaikantinum, sum veita góðan samanhang millum tað nýggja tjóðleikhúsið, ta longu forhøllina og sjógvin og geva møguleikar til góð pláss at halda til og pláss, hagar ein kann flyta virksemi úr bygninginum út á kaiina eins og dráttur flytur bát millum vátt og turt.

Dómsnevndin metir, at um staðsetingin av Tjóðleikhúsinum á havnarlagnum verður tillagað nakað, verður samspælið við Skansan og Tinganes betur. Eitt hjartamál hjá nevndini hevur verið, at tann nýggi bygningurin ikki oyðileggur tað søguliga samspælið millum tey týdningarmiklu mentanarsøguligu og býarlandslagsligu støðini Tinganes og Skansan, men verður settur einastaðni á tí stóra havnarøkinum, sum letur upp fyri eygnasambandi, samstundis sum býarlívi, ferðslukrøv v.m., kunnu verða gingin á møti. Við at flyta tjóðleikhúsgrundøkið burtur frá høvuðsásinum millum Tinganes og Skansan kann tjóðleikhúsið gerast eitt nýtt triðja punkt, ið stuðlar uppundir hinum báðum. Hetta fer eisini at geva gongugøtuni betri tilknýti til Skansan.

**Byggibæri, heildarbúskapur og umhvørvisatlit**
Bygningurin hevur partvíst organiskar og rundar formar, men er samstundis tættur við einføldum loddrøttum veggjum. Veggirnir eru í høvuðsheitum úr viði og vindeygakarmar úr sama viði. Sostatt er tilfarið, sum valt er, tað sama sum í fleiri øðrum uppskotum.
Bløðrudekkini eru tilfar, sum munar og gevur nakað av umhvørvisvirði.
Flagtak og fleirára staudir krevja lítið viðlíkahald.

Teir givnu prísirnir mugu eftirkannast, men tykjast kortini at geva ábending um príslegu. Tað sær út til, at allur kostnaður er tikin við uttan tann fyri at ríva núverandi bygging niður.
Meiri skjalprógvan krevst, viðvíkjandi hvørji atlit eru tikin til skjálvtar og láfrekvent ljóð sum nevnt í tekstinum. Tað stendur ikki lýst, hvørjum tilfari brúgvin er gjørd úr, og tað eigur at verða kannað, um tað ber til at spenna frítt yvir til Skansan. Lyftan, sum er í uppskotinum, og trappan upp til brúnna eiga at verða endurskoðaðar.

**3. virðisløn: uppskot 17283 –** ***Tjóðpallur Føroya (Kontrast / Schmidt Hammer Lassen Architects / H+)***




**Arkitektonisk hugsjón**
Hugsjónina í uppskotinum – um húsið sum eina bygd við smáum rúmum og væl kendum tilfari sum viði og grasi – heldur dómsnevndin vera sera dámliga. Hon hevur støði í eygleiðing av merking byggingarinnar rundanum, og í hvussu ein flytur seg, og savnar tískil smærri bygningsrúm í ein bólk, sum er so opin í síni samanseting, so poknutur, at ein til gongu fær farið ígjøgnum. Tað er galdandi fyri Tinganes, tað er galdandi fyri byggingina norðan fyri Havnargøtu, og tað er galdandi fyri Tjóðpall Føroya. Men alt húsið hevur sera stóra rúmd og er formað nakað sum eitt rektangul og hevur stórar síður við ongum vindeygum. Virksemi í byggiskránni er her flutt yvir í leysstandandi rúmdir – palltorn, black box, lítlapall o.s.fr. – sum verða staðsett eitt sindur burtur hvørt frá øðrum við einum rættvinklalogikki á tí flata havnarøkinum. Millum hetta verður sett eitt dekk á fyrstu hædd – har ið høvuðsinngongdin er – og eitt takdekk. Samansetingin í hesum bragdi fær tær sera eyðsýndu inngangstrappurnar aftur at sær, sum toyggja seg út í eitt at vísa seg javnsett bragd ímóti øllum fýra heimshornum, men sum í veruleikanum er sera sundurbýtt, og bara eitt virkar sum høvuðsinngongd. So tað er ikki so líkatil við tí poknuta. Tó verður skotið upp, at niðari partur av forhøllini verður brúktur sum bíðirúm til ferðafólk til buss og ferju, men økið er ikki væl skikkað til slíkt

– annars sera týdningarmikið – virksemi, hvørki í staðseting ella skapi. Dómsnevndin ivast eisini í, um smárúmsbýtið fer at virka, soleiðis sum ætlanin er, eftirsum almenna tilboðið á hesari hædd er lutfalsliga lítið og flestu húsaveggirnir hava eingi vindeygu.



**Funktionalitetur**
Uppskotið skapar við síni hugsjón nakrar fortreytir, sum ikki hóska saman við vælvirkandi tjóðleikhúsi. Bæði lítlisalur og black box eru avbyrgd frá "back of house" virki sum síðu- og bakpøllum, verkstøðum og listafólkahentleikum. Hóast sambandið til forhøllina og áskoðararnar er gott, fer kanska tvørgangandi ferðsla at taka seg upp við vørum, áskoðarum og listafólki ólagaligar tíðir av degnum.
Staðsetingin av høvuðspalli og hansara samband við "back of house" og síðu- og bakpallar er nøktandi.
Verkstøðini og starvsfólkaøki eru hóskiliga staðsett í húsinum, og teirra samband við vøruavgreiðslu og starvsfólkainngongd er gott.
Forhøllin er í tveimum hæddum við útsýni ímóti Tinganesi. Tað hevði verið eitt fínt íkast til at fáa havnarmótið uppí og til at vísa fram virksemið í húsinum.
Samstundis eru black box og lítlipallur staðsett við framsíðuna suðureftir, og í báðum eru vindeygu út ímóti skipunum. Hóast tað kundi verið fínt við vindeygum og dagslýsi í einum sali, so átti í hvussu er black box at verið vindeygaleys. Vindeygaop eru trupul, tá ið tað snýr seg um ljósseting, óljóð og akustikk. Tað er serstakliga galdandi í hesum føri við havnarvirksemi. Stórisalur og pallar hava fingið gott stað mitt í húsinum. Tað gevur góðar verjugeirar rundan um hesar funktiónir. Balkongin er ikki best, tá ið talan er um akustikk í salinum, og hallið á gólvstólunum er ov bratt. Áskoðarar og stólar virka tá sum ljóðdoyvarar. Tað fer møguliga at hava við sær, at tað verður sum "at spæla inn í eina dýnu".
Allir salir og øll palløki mangla slúsur, og summi av gangiøkjunum eru ov smøl til at flyta størri lutir. U-formurin á loftsbrettunum í stórasali ger tað ógjørligt at seta ljós eftir allari longdini á pallinum. Atkoma til orkesturgrøv er ikki lýst.

**Samspæl við nærumhvørvi**
Tilsamans mynda bygningsrúmini eitt rektangul at kalla, sum verður sett rættiliga nær við og javnfjart við kaikantin. Hetta tilknýtið verður brúkt til fulnar í miðrúmdini í húsinum, sum á tveimum dekkum breiðir seg út ímóti sjónum. Men at vera so tætt við kaikantin avmarkar partvíst virksemi, sum hevði kunnað verið her, t.d. við gongustíggi fram við kaikantinum. Men hetta síðsta er eisini ætlanin, tí at uppskotssetararnir vilja í staðin síggja gestirnar fara heilt upp á ovastu hædd á bygninginum, takdekkið, og her ganga ímillum tey ovastu samansettu rúmini, sum standa her við útsýni í landsynning og útsynning. Dómsnevndin heldur tó ikki, at hetta taklandslag er nóg lokkandi, tí at tað verður í veruleikanum langar, smalar gongir millum lokaðar veggir og avmarkað útsýni, uttan tá ið ein stendur yvir høvuðsrúminum við kaikantin.

Men uppskot er um at leggja eitt tilhaldsøki við sitiplássum sunnanfyri út ímóti sjónum beint útnyrðingsmegin bygningin. Tað hevði lagt lokkandi tilhaldsmøguleikar aftur at økinum og kann kanska útbyggjast við flótandi palli. Á leiðini frá miðbýnum til tjóðleikhúsið verður skotið upp at hava fleiri smærri bygningar – sáddar fram við berginum. Tað vísir, hvussu torført tað er at fáa tjóðleikhúsið til part av núverandi miðbýi.
Í ferðsluhøpi er bussteðgiplássið í uppskotinum ikki ætlað til gjøgnumkoyring og tykist vera ov trongt.




**Byggibæri, heildarbúskapur og umhvørvisatlit**
Hugskotið gevur, sum vera man, nógvar metrar av húsasíðum. Tað kann ávirka bæði byggikostnað og viðlíkahaldsútreiðslur. Tað eru ofta avbjóðingar, har tak og húsaveggur møtast, og húsaveggur og lendi. Staðseting og formur kundi vunnið við størri denti á sól- og vindviðurskifti millum bygningskropparnar. Gott og partvíst $CO_2$-vinarligt tilfar er valt, hóast byggingin ikki leggur serligan dent á nýskapandi burðardygdarloysnir. Útiøki, altanir o.a. krevja góða og umhugsaða vatning. Tann givni prísurin fyri byggingina tykist liggja ov lágt.

**3. virðisløn: uppskot 27072 – *Leikhúsið við heimsins enda***
***(SNA – Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f í samstarvi við White Arkitekter, Stockholm )***



**Arkitektonisk hugsjón**
*Leikhúsið við heimsins enda* talar við føroyskar bókmentir og føroyskt landslag. Sum ein lokað heild lænir bygningurin sín form frá føroyskum fjøllum við loddrøttum veggjum og skráandi grasklæddum flatum – vit kunnu siga "hús sum fjall", men eisini "hús sum lysthús ella paviljong" við teimum týðiligu japonsku tilvísingunum. Um somu tíð róligt, og um somu tíð stórt, myrkt og dramatiskt. Grundflatmyndin spælir upp til Skansans formar og stødd og fær kós partvíst frá Havnargøtu og partvíst kaikantinum. Inni verða pallarnir pakkaðir tætt saman og skapa týðiligt sundurbýti millum front-of-house og back-of-house.

**Funktionalitetur**
Verkætlanin hevur týðiligt sundurbýti millum front-of-house og back-of-house. Sambond og staðseting av salum og pallum er fyri tað mesta nøktandi, men undantikið sambandið millum síðupall og lítlasal. Samstundis er tað ógreitt, um bakpallurin er lagdur burtur við vilja. Tað hevði, í hvussu er, givið trupul arbeiðsviðurskifti bæði til montering og til uppseting av leikum. Ein slík loysn hevði kravt eina aðra, skjalprógvaða virkistilgongd til pallstaðsetingina.
Verkætlanin hevði skulað verið bøtt viðvíkjandi virksemi á fleiri økjum.
Hallið á áskoðaraplássunum sær skilagott út. Síðubalkongirnar spilla ikki ljóðið fyri áskoðararnar.
Veggirnir millum salirnar mugu býtast sundur fyri at forða fyri ljóðflutningi og afturljóði millum salir.



Palltorn og snóraloft sær nøktandi út, men ikki staðseting av og atkoma til arbeiðsplássini har.
Í forhøllini er ikki greitt frá ljóðstýrandi tiltaki undir loftinum, men um arbeitt varð víðari, kundi hetta verið loyst. Sum í fleiri øðrum verkætlanum er vesitørvurin undirmettur ella skeivt staðsettur.




**Samspæl við nærumhvørvi**
Uppskotið hevur bara í avmarkaðan mun arbeitt við umhvørvinum. Tó verður skotið upp at vaksa um kaiøkið framman fyri húsins longsta veggi og forhallarrúminum og soleiðis hava fínt samband við vágna. Tað verða gjørdar stórar sititrappur oman móti sjónum, og saman við einari gøtu eftir longdini inni í bygninginum letur tjóðleikhúsið seg upp, og útiøkini í nánd verða eitt gott mið hjá fólki til gongu og gestum, sum ikki beinleiðis fara til sjónleik.

Høvuðsinngongdin til tjóðleikhúsið er staðsett út ímóti busssteðgiplássinum og ikki, sum tykist meiri upplagt, út ímóti tí nýggju, almennu gongugøtuni fram við kaiini. Í samsvari við kappingartilfarið er húsið staðsett mitt ímillum Tinganes og Skansan, men roynt verður við skráandi tøkum at minka um húsins stødd á hesum viðkvæma stað.

**Byggibæri, heildarkostnaður og umhvørvisatlit**
Ítøkiligur og tann lættasti at byggja av bygningunum. Nakað ógreitt viðvíkjandi lýsing av sólkyknuloysn og taktilfari. Nógvur viður. Hava lagt dent á byggibæri og umhvørvisatlit.
Uttan so at skjalprógv fæst fyri, at aluminiumið, sum verður brúkt, er endurvunnið minst eina ferð, er tilfarið í tí tunga endanum av $CO_2$-pyramiduni. Byggingin fylgir siðbundnum skipanum og reglum. Fermetraprísurin tykist veruleikakendur.

**3. virðisløn: uppskot 36912 – *Rípa (ZETA architect / BRIM Arkitektar)***




**Arkitektonisk hugsjón**
Rípa er dreymurin um altíð gott veður í einum dramatiskum og broytiligum veðurlag. Byggilistarliga talað er tað umsett til eina stóra ellipsuformaða glasskel, sum kransar eina ekspressiva træbygging, sum innan í sær rúmar sjónleikavirki og í yvirgongdini til skelina letur upp fyri vitjandi. Uppskotið er sera djarvt í sínum høvuðsbragdi: royndartilgongdin og tann eyðsýndi og flotti formurin. Blandið av flóð millum almenningin og framleiðslu/leikarar skapar nýggjar áhugaverdar mátar at gera sjónleik. Tíverri tykist formurin at hava tikið stýringina í ov stóran mun aftur ímóti virksemi í tjóðleikhúsinum.

**Funktionalitetur**
Verkætlanin hevur ta mest royndarkendu staðsetingina av virksemi. Ein samanhangandi forhøll verður gjørd fram við allari útsíðuni á bygninginum. Forhøllin er kransur um allar salir, pallar og verkstøð. Á tann hátt flóta áskoðaraøkini front-of-house saman við back-of-house økjunum. Har er einki sundurbýti, og øll flyting av áskoðarum, listarfólki og vørum henda partvíst í sama øki.
Salir og bak-/síðupallar eru løgd á ein ás á rað. Hetta gevur nýggjar nýtslumøguleikar og møguleika at lata upp millum salir. Hesin fleksibilitetur er lokkandi, men verður arbeiðskrevjandi at fáa í lag. Loysnin krevur, at akustikkur og ljóðviðurskifti verða kannað, við serstøkum loysnum fyri hurðar og sambond.
Gongin millum stórasal og bakpall er ikki eftirynskjandi. Palltorn og snóraloft eru nakað lág. Stórisalur hevur eina djúpa balkong, sum gevur avbjóðingar viðvíkjandi akustikki hjá áskoðarum undir úthanginum. Staðseting av ljósbrúgvum vantar. Rørslan uppeftir í húsinum á ymsum trappum undir glaskúpuni er ikki frí, og dómsnevndin ivast í, um sambandið fer at lokka áskoðarar til hesar funksjónir sum ætlað. Forhøllin er fyri tað mesta gjørd úr hørðum tilfari, og tað hevði kravt serstøk tiltøk til at fáa nøktandi ljóðviðurskifti her. Glasið í klimaskíggjanum hevði skulað lokið eitt ljóðkrav upp á 70 db, sum er eitt sjáldsama tjúkt glas.



**Samspæl við nærumhvørvi**
Tann stóra ellipsan er sum byrjan ikki knýtt at nøkrum í sínum umhvørvi, men er kortini leysliga fallin inn í samanhangin við at tilpassa kaikantin og verður innrammað av nýggjum bygningum báðumegin, bústaðarbygging sunnanfyri og øðrum smærri bygningum, sum møguliga kundu havt býarlívshóskandi virksemi. Harafturat verður ein fín inngongd og góð sitipláss skapað uttan á skelini við at forma lendið rundan um glasskelina.
Glasskelin er ein sera stór byggirúmd, sum reisir seg rættiliga eyðsýnt upp á havnarøkinum, m.a. upp um Skansans ovara støði. Men palltornið er ikki nóg høgt, tískil verður glasskelin hægri. Bussfarstøð og bussteðgipláss eru skipað fínt, einfalt og brúka ikki ov nógv pláss, sum kanska kann minkast enn meir. Vegurin frá miðbýnum við 'kiss and ride' við tjóðleikhúsið riggar eisini væl, men parkeringsplássini eru rættiliga kleimd ímillum bygning og rundkoyring og káma bygningsins ætlaða frælsi frá umhvørvinum.




**Byggibæri, heildarkostnaður og umhvørvisatlit**

Grundtankin við at byggja eitt hús innan í einum húsi er góður. Tað veitir verju og lítlan viðlíkahaldskostnað fyri bygningina innanfyri. Tað er óvist, um glaskúpan kann setast upp fyrst og síðani byggja restina.
Fyrimunir og vansar við tí stóru glaskúpuni eru lítið viðgjørdir, og inniklima og burðardygd eru avbjóðandi. Tað hevði verið áhugavert at vita, hvørji hugnarúm ein sá fyri sær í kúpuni, og um hon kundi verið hálvklimatiserað.
Konstruktiónin er í grundini møgulig, men hevði kravt nógv skjalprógv frá øllum tøkniligum fakum um eitt nú bruna, statikki og tilfarsvali. Verkætlanin er tann største í vídd og er hugsandi eisini tann dýrasta at byggja.

Tórshavn 01.09.2022

Ólavur Jøkladal

Poul Geert Hansen

Bjarni Wilhelm

Jenny C. Petersen

Birita Wardum

Bárður í Baiansstovu

Ellen Marie Braae

Kjetil Thorsen